# Útlitini eru ótrygg

**Tað økir ikki um íløguhugin, at tað koma ógreiðar meldingar frá myndugleikunum, soleiðis at fiskivinnan ikki veit, hvat hon skal fyrihalda seg til, sigur Olaf Olsen, reiðari**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

Olaf Olsen, reiðari, heldur ikki, at íløguhugurin hjá føroysku reiðarunum fer at vaksa í komandi árum við teirri ótryggu støðuni, vit í løtuni eru í. Heldur fer hann at kølna.

– Tað er ikki mennandi fyri vinnuna, at summir, helst embætismenn, tosa um at leggja avgjøld á fiskiloyvini, hóast verandi fiskimálaráðharri ikki er fyri tí. Hann situr ikki um allar ævir, og so kann henda, at avgjøldini koma, sigur Olaf Olsen.

Inni á skrivstovuni hjá reiðarínum Beta í Runavík, sum rekur Kubatrolararnar, situr Olaf Olsen við eini rúgvu av pappírum framman fyri sær, samstundis sum rokniarkið er opið á telduskíggjanum. Hann roknar út og ger metingar um, hvussu fer at bera til í framtíðini.

– Ikki, tí, sigur hann. Árið ið júst er farið, gav einki undirskot, men har leyp heldur einki av, letur hann at.

Orsøkirnar eru so ymiskar til tað. Nógv tann størsti parturin av veiðuni hjá Kubatrolarunum er upsi, og upsaprísurin lækkaði í fjør í mun til 1999, meðan oljuprísurin helt eina himmalferð, sum neyvan er sædd áður.

Olaf Olsen vísir til sammetingar á, at í 1999 brúkti reiðaríið fyri 5,6 milliónir krónur í olju, meðan talið í fjør var heilar 10 milliónir. Og júst hesir báðir faktorarnir, fiskaprísur og oljuprísur, týða rættiliga nógv her.

### Byggja nýtt

Nýggj ísfiskaskip bera seg ikki í traditionellari ísfiskavinnu undir Føroyum, sigur Olaf Olsen. Hann hugsar seg um. Roynir at leita aftur í tíðina til at finna onkran, sum kann avsanna hansara pástand, men dugir ikki at finna nakran, sum ikki á einhvønn hátt hevur havt hjálp fyri neyðini seinastu mongu árini. Og tað stuðlar ikki undir at fara at byggja nýtt, sigur hann.

Men kortini arbeiðir reiðaríið Beta júst við at fáa sær nýggj skip. Kubatrolararnir eru gamlir. Teir vórðu keyptir í 1973, so tað nærkast skjótt 30 árum, síðan teir komu til Føroya. Átta eru teir í tali, men ivaleyst verða tað færri skip, sum fara at loysa teir av, sigur Olaf Olsen, reiðari.

Hann metir, at tað kanska endar við, at tað verða seks skip, tá allur flotin er skiftur út. Men nær tað fer at verða, dugir hann ikki at siga. Og tey verða so ikki øll skift út samstundis.



*Tað er ikki mennandi fyri vinnuna, at útmeldingarnar frá myndugleikunum eru so ótryggar, sum tær eru í løtuni. Hetta minkar um hugin at gera nýggjar íløgur í skip, sigur Olaf Olsen*

*Mynd: Edvard Joensen*

Olaf Olsen, sigur, at teir arbeiða í løtuni við at fáa tvey nýggj skip. Umsókn um innflutningsloyvi er send Fiskimálastýrinum, men enn er svar ikki afturkomið.

Hinvegin er málið ongan veg komið sum so, sigur Olaf Olsen. Fígging og tílíkt er lítið gjørt við.

Tað er aftur hatta har við ótryggleikanum. Tað ber illa til at fara at byggja skip, um væntast kann, at fyritreytirnar broytast kanska um eini tvey ár. Hann kemur aftur inn á avgjøldini, sum embætismenninir eru farnir at tosa um.

### Neyðugt við nýggjum

Neyðugt er við útskiftingum í flotanum, er Olaf Olsen sannførdur um. Og hann er líka sannførdur um, at tá skift verður út, skulu skipini, sum aftur koma, vera nýggj. Tað er ikki nóg gott at keypa gomul skip fyri onnur gomul. Hugsast skal eisini um at fáa fólk at trívast umborð, sigur hann.

Tað er sera einfalt at hugsa sær, at ungt fólk fæst ikki umborð á gomul, ótíðarhóskandi skip, um annað fæst. Og eins og skipini eldist fólkið og skal skiftast út.

Men dýrt verður tað. Tað er greitt, at kapitalkostnaðurin fyri eitt nýtt skip fer at tyngja raksturin mundandi. Serliga eru tað rentur og avdrøg eins og tryggingar, sum verða tung hjá einum nýggjum skipi í mun til eitt gamalt. Hinvegin verða ivaleyst eisini fyrimunir, sum skulu viga upp í móti tí, tey gomlu skipini eru býligari.

Olaf Olsen sigur, at teir hava kannað, hvussu príslegan fyri skipabygging er her um okkara leiðir. Og úrslitið er, at skal byggjast, verður tað helst í Spania, tí har er nógv bíligast at fáa skip smíðað. Kina er kanska eisini ein møguleiki, sigur hann, men leggur aftrat, at vit vita ikki so nógv um skipasmíð í Kina enn. Spania kenna vit hinvegin betri, hóast onki føroyskt skip enn er smíðað í Spania, sigur Olaf Olsen.

Men hann er varin kortini. Hann melur aftur á hatta við útlitunum. Eitt er, at stuðulin av ymsum slagi, sum skipini higartil hava fingið, minkar burtur. Men so til at leggja beinleiðis avgjald á fiskiloyvini, heldur hann vera í so ógvusligt. Og tí er neyðugt at vita, áðrenn bygt verður, hvussu støðan verður, tá skipini eru liðug.



*Kubatrolararnir eru gamlir og treingja til at verða skiftir út. Men fyrst vil reiðarin vita, hvør støðan hjá myndugleikunum til fiskiloyvini er*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Stúra fyri kríggi í Miðeystri



**Steðgar ófriðurin í Miðeystri ikki innan stutta tíð, er stórur vandi fyri, at veruligt kríggj brestur á, heldur føroyska Hanna Katwan, sum býr har norðuri í Ísrael**

ÓFRIÐUR
*Eyðun Klakstein*

Ófriðurin í Ísrael og í sjálvstýrandi palestinska økinum er vorðin so drúgvur og umfatandi, at fólk í Ísrael stúra fyri veruligum kríggi

– Støðan er á markinum til veruligt kríggj, og í løtuni stúra vit fyri framtíðini, sigur Hanna Katwan.

Hon er úr Føroyum, men er búsitandi í Ísrael, har hon eisini hevur familju.

– Vit merkja ikki nógv til ófríðin her norðuri í Ísrael, men á sjúkrahúsinum í Haifa, har eg arbeiði, síggi eg javnan avleiðingar av ófriðinum. Fyri stuttum kom eitt barn á sjúkrahúsið, sum var illa brent av einum bumbu, sigur hon.

### Drúgt stríð

Ófriðurin í Miðeystri hevur verið áhaldandi seinastu mánaðirnar, og hóast tað hevur verið roynt við friðarsamráðingum millum ísraelsmenn og palestinar av einum og øðrum slagi, er einki veruligt úrslit komið burturúr.

Nú er støðan vorðin so spent og hættisligt, at hendur eitt hvørt ikki innan stutta tíð, er vandi fyri veruligum kríggi.

Fráfarandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, leggur í hesum døgum stóran dent á friðararbeiðið í Miðeystri, men hann hevur freist til 20. januar at finna eina loysn, og tað verður av mongum mett at vera ósannlíkt.

Í fyrstu syftu hevur arbeiðið hjá honum snúð seg um at fingið partarnar at góðtaka eitt samráðingarupplegg, men serliga palestinski leiðari, Yassir Arafat, hevur verið trekur at góðtaka hetta upplegg.

### Báðir partar mugu geva eftir

Hanna Katwan heldur tað vera merkisvert, at ísraelsmenn ongantíð áður hava viljað givið seg so nógv sum júst nú, men hóast tað brestur stríð á.

– Báðir partarnir hava gjørt mistøk og mugu geva seg fyri at fáa frið í lag, sigur hon.

– Ísraelar hava givið eftir fyri nógvum av krøvunum hjá palestinum, men tað tykist ikki, sum palestinar hava hug at sleppa summi av krøvunum. Teir verða eisini noyddir at geva seg nakað, um ein friðaravtala skal spyrjast burtur úr.

Í løtuni er eitt av stóru stríðsmálunum tey mongu palestinsku flóttarfólkini, sum eru í Palestina, men vilja sleppa aftur til Ísrael at búgva. Í uppskotinum hjá Bill Clinton, forseta, skulu hesi ikki aftur til Ísrael, men tað vilja palestinar ikki góðtaka.

– Tað ber heilt einfalt ikki til hjá Ísrael at taka ímóti hesum fólkunum, heldur Hanna Katwan.

– Ísrael skal royna at geva seg so nógv, tað fær, fyri at fáa frið í lag, men eitt mark má vera, um ísraelar framhaldandi skulu hava eitt land í Miðeystri.

### Kríggið kann breiða seg víða

Bardagarnir millum ísraelar og palestinar hava verið blóðugir og hava longu kostað nógv mannalív, men stríðið kann fáa nógv størri avleiðingar, um veruligt kríggj brestir á.

– Vit vóna, at vit sleppa undan einum kríggi, tað vildi fingið óhugnaligar avleiðingar. Vandi er fyri, at eitt stríð millum palestinar og ísraelar kundi breitt seg rættiliga víða, heldur Hanna Katwan.

– Hóast vit búgva í einum friðarligum øki í løtuni, so stúra fólk fyri framtíðini og einum møguligum kríggi. Júst nú sær tað eitt sindur svart út, sigur hon.

– Tað er trupult at fáa frið í lag, men partarnir verða noyddir at geva seg, tí annars endar tað heilt galið, sigur Hanna Katwan.

Friðarsamráðingar við Bill Clinton á odda halda fram komandi dagarnar, og vónin er, at ein ella onnur avtala kann gerast, áðrenn Clinton fer úr embæti sínum 20. januar.

*Føroyska Hanna Katwan, sym býr í Ísrael, stúrir fyri, at kríggj kann bresta á í Miðeystri, um ófriðurin ikki verður steðgaður innan stutta tíð*




made by VIT

## Tekniskur leiðari

VIT sp/f sóknast eftir tekniskum leiðara at byrja skjótast til ber.

Ert tú verkfrøðingur, datalog ella hevur tú drúgvar royndir innan umsiting av teldukervum, er starvið sum tekniskur leiðari hjá okkum kanska nakað fyri teg.

Sum tekniskur leiðari kemur tú m.a. at standa fyri hesum uppgávum:

- Rakstur av innanhýsis teldukervi til menning av e-business webskipanum
- Rakstur av Hosting Center til e-business webskipanir
- Samskipan av netumsitingini hjá kundum okkara

Hevur tú hug at royna teg sum tekniskur leiðari í einari dynamiskari og spennandi fyritøku í vøkrum umhvørvi undir Bryggjubakka, send okkum so eina umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir o.ø.

Løn og arbeiðstíðir verða at avtala nærri.

Um tú hevur hug at vita meira um starvið sum tekniskur leiðari hjá okkum, ert tú vælkomin at ringja 319914 og spyrja eftir Óla Olsen.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. januar 2001.

P/F VIT - undir Bryggjubakka 17 - FO-100 Tórshavn
tlf: 31 99 14 - e-mail: vit@vit.fo - url: www.vit.fo

P/F VIT er ein KT-fyritøka, sum arbeiðir við menning av dynamiskum webloysnum, ráðgeving innan E-business & umsiting av teldunetum. Umframt hetta eigur og rekur P/F VIT internetportalin in.fo. 10 fólk starvast í løtuni hjá P/F VIT -Farodane eigur 80% av P/F VIT og starvsfólkini eiga hini 20%.